## Bókaummæli:

# — at prógva ella mótprógva sjónarmiðum Zachariasar...



*Øllum teimum, sum hava áhuga fyri føroyskum stjórnarmálum og sum ætla sær at greiða atkvøðu á komandi fólkaatkvøðugreiðslum og valum, fari eg at mæla til at lesa hesa spennandi og lættlisnu bók, sigur Sveinur Ísheim Tummasarson í ummæli av bókini hjá Zacharias Wang: **Føroya á vegamóti***

**Zacharias Wang: Føroyar á vegamóti**; Forlagið Stiðin, Tórshavn 1999.

Mæti týski rithøvundurin, Heinrich Bøll, sigur frá upplivingum sínum, tá ið hann var byrgdur inni í eini hermannalegu eftir seinna heimsbardaga. Hann varnaðist, at týskarar knappliga vóru farnir at hava ans fyri skemtisøgum — í øllum førum tá ið útlendingar bóru tær fram. Ja, sjálvur Egelhect flenti, tá ið ameriski kapteynurin, sum stóð á odda fyri leguni, peikaði á píkatráðin og mælti: “Hatta skulu tit einki leggja í, boys. Nú eru tit endiliga fríir.”

Avmarkað fólkaræði er andsøgn í sjálvum sær. Ein skipan við fólkaræðiligum eyðkennum, sum er galdandi á serstøkum samfelagsøkjum, og sum er sett í verk onkustaðni úr erva niður yvir eina tilvitaða tjóð, kann ongantíð skírast fólkaræðilig.

Umfatandi og dýrar kanningar, sum føroyski skattgjaldarin hevur goldið, viðgera ikki spurningin, um Føroyar eru innlimaðar í danska ríkið, nær tað er hent — ella um heilt onnur skipan er galdandi.

Hvítabók tekur upp mong spennandi viðurskifti, men tá ið um fyrrverandi og núverandi ríkismørk føroyinga ræður, kemur Hvítabók til, at ymisk sjónarmið eru um hetta mál, og niðurstøða er eingin. Nú hevur ein borgari, sum hartil er stjórnmálafrøðingur, granskað hetta ivamál í mong ár, og tað tykist, sum tað eydnast at greiða fleiri og fleiri søguligar og stjórnmálafrøðiligar fløkjur við at byggja á hugsan hansara. Fyri jól gav hann út bók, ið greiðir frá broytingum í ríkismørkum føroyinga og broytingum í stjórnarskipan - frá landnámi til henda dags. Men áðrenn nortið verður við innihaldið, er neyðugt at víðka samfelagsvísindaliga rásarúmið.

**Stjórnmálafrøði og stjórnarmál**

At ummæla fagrar bókmentir er ikki tað sama sum at ummæla vísindaligar ritgerðir. Ein sum ummælir eitt yrkingasavn tekur støðu til úrtøkilig og fagurfrøðilig fyribrigdi; men ein sum ummælir vísindaliga ritgerð verður at taka støðu til viðurskifti, sum eru meiri ítøkilig: Er ivamálsorðingin rímilig, tekur rithøvundurin upp tey týdningarmestu vandamál, sum teingjast evninum, og viðger hann tað, sum aðrir rithøvundar hava skrivað um evnið? Eru niðurstøðurnar grundaðar á skilvísa viðgerð av ivamálsorðingini og vísindaligar prógvgrundir? Hóast vísindaliga ritgerðin lýkur allar treytir, er ikki vist, at niðurstøðurnar verða tiknar til eftirtektar, men tað er heilt annað mál. Um ein lækni, sum starvast á rannsóknardeildini hjá eini tubbaksfyritøku, skrivar eina vísindaliga ritgerð, ið prógvar at tubbakk er sera skaðiligt fyri heilsuna og drepir milliónir av fólki, fær tað helst onga aðra avleiðing enn, at hann verður sagdur úr starvi. Men harvið eru niðurstøður hansara ikki vístar aftur. Vísindaligt starv er nú so, at tað skal bera til at kanna, um prógvgrundir og niðurstøður eru skeivar. Hagar til at gjørdar niðurstøður eru mótprógvaðar á sama skilvísa hátt, verða vit at góðkenna, at tær eru galdandi.

**Ríkisstjórn við gomlum norskum heimildum**

Í bókini “Føroyar á vegamóti” verður endaliga prógvað, at Føroyar vóru partur av Noregs ríki frá einaferð í miðøld til 1814. Hetta vikast ikki, tí millumtjóðadómstólurin í Haag hevur dømt, at so var. Føroyingar, sum føddur vórðu fyri 1814, vóru tí norskir ríkisborgarar. Millumtjóðadómstólurin dømdi eisini, at viðurskifti føroyinga við kong broyttust ikki við friðarsáttmálanum í Kil 1814, tá ið medborgarar okkara í Noregi gjørdust borgarar í nýggjum ríki. Um føroyingar eftir hetta skuldu gerast danskir ríkisborgarar uttan at samtykkja hetta sjálvir, so máttu teir søkka niður á hjálandastig og missa rættindi síni fyrst, og síðani skuldi danska ríkið einvíst havt innlimað Føroyar og føroyingar — men tað finst einki prógv fyri, at hetta er farið fram. Føroyingar hildu tí áfram at vera ríkisborgarar undir kongi sínum.Føroya Amt, sum varð sett á stovn 1816, hvíldi trygt á gomlum norskum heimildum, og tá høvdu Føroyar eisini verið í amtsskipanini í væl meiri enn hundrað ár – bara uttan at vera serstakt amt. Tá ið eingi prógv eru at finna fyri einum uppáhaldi, so ber til at reka fram undir. Ríkisstjórnin hevur ført fram slíkt, ið er satt, uttan at seta tað í rætt høpi. T.d. verður sagt, at Danmarks Riges Grundlov er galdandi í Føroyum, og at ríkisrættarliga støða Føroya er ásett í henni og í heimastýrislógini. Zacharias Wang er samdur í hesum, men hevur greiða niðurstøðu: Grundlógin og heimastýrislógin eru galdandi í Føroyum sambært gomlum norskum heimildum, ið liggja hjá einaveldiskongi. Báðar eru dømi um, at einaveldiskongur hevur slakað fyri fólkaræðihugsanini á ávísum samfelagsøkjum — tó uttan at fólkaræði varð sett á stovn – og tær broyttu tískil einki ríkismark.Tí er tað skeivt, sum embætismenn í Føroyabólkinum hjá forsætisráðnum førdu fram undir krígnum, at danska grundlógin fekk gildi í Føroyum 5. juni 1849 (samstundis sum í danska ríkinum), tí Føroyar longu vóru partur av danska ríkinum. Nei, hon var ikki galdandi fyrrenn 1850, tá ið einaveldiskongur læt embætismenn sínar lýsa hana her — og tá sum lóg, ikki grundlóg. Og heimastýrislógin varð ikki galdandi í Føroyum, tá ið hon varð lýst í danska ríkinum, men tá ið kongur læt embætismenn sínar lýsa hana í Dimmalætting – v.ø.o. hesumegin ríkismark.Tá ið Fólkaítakið fyri Tjóðfundi setti fram krøv um fult fólkaræði, læt einaveldisstovnurin (tá sum nú er suverænurin Margreta drotning) donsku ríkisstjórnina taka uppaftur áðurnevndu sjónarmið síni, sum eru røtt; men ríkisstjórnin sýtti fyri at svara spurninginum um grundleggjandi heimildirnar. Hetta hendi 14. september 1995, og tað førdi okkum út í eina konstitutionella kreppu.Danska ríkisstjórnin við Poul Nyrup Rasmussen á odda hevur mestsum tikið einaveldisdrottin av ræði og er løgst á heimildir hansara. Heimildirnar hjá øllum forsætisráðharrum í Keypmannahavn viðvíkjandi Føroyum hava verið norskar, og teir hava nýtt tær, uttan tó at nevna tær at navni. Poul Nyrup Rasmussen er hin fyrsti forsætisráðharri, sum beinleiðis vísir frá sær føroyskum krøvum, ið vísa til hesar norsku heimildir hansara. Føroyska sjálvstýrisrørslan hevur tískil skotið við síðuna av málinum mesta partin av síni tíð, og Fólkaítakið fyri Tjóðfundi má sigast at vera eitt nýbrot í føroyskum stjórnarmálum.

**Fólkaræði sumhugmynd**

Nú á døgum er fólkaræði so grundfest hugmynd í samfeløgum um okkara leiðir, at eingin stjórn kann liva við at fáa tað skoðsmál, at hon ger seg inn á hesa hugmynd. Bókin hjá Zachariasi Wang er ein serstakliga álvarsom ákæra frá einum borgara móti myndugleikunum í føroyska samfelagnum, báði í Keypmannahavn og Tórshavn. Ein ákæra um, at hesir myndugleikar á grundleggjandi hátt gera seg inn á fólkaræðihugmyndina og rættindi borgaranna.Bókin “Føroyar á vegamóti” er ein stórur steinur oman á ta tungu byrði, sum liggur á donsku ríkisstjórnini. At hugsa sær: krevja valdið í føroyska samfelagnum — og sýta fyri at leggja fram prógv! Skal hatta vera lagið, tá kann einhvør onnur ríkisstjórn koma við sama kravi, og tá livir bara hvør, sum sterkastur er. Bókin setir eisini krøv til sjálvstýrissamgonguna og flokkarnar aftan fyri hana. Hví skulu vit borgarar nú fara at stovna nýtt ríki, soleiðis sum samgongan vil? Hetta er sum at fara yvir um á eftir vatni, tí trupulleikin er ikki ríkismarkið mótvegis danska ríkinum, soleiðis sum sjálvstýrisrørslan hevur hildið. Trupulleikin er, at vit borgarar ikki hava fólkaræði, og at tað fullveldi, sum varð latið kongi fyri øldum síðani, er endað í hondunum á donskum tjóðskaparmonnum. Nútímagjørda einaveldisskipanin virkar ikki longur, tað nyttar einki at dagføra hana — vit mugu hava nýggja skipan. Vónandi er hetta tað, sum samgongan fer at føra fram í samráðingunum við ríkisstjórnina í Keypmannahavn. Heilt einfalt eigur hon at fara niður eftir teimum gomlu norsku heimildunum og stovnseta føroyskt fólkaræði — ikki eitt nýtt ríki. Og sambandsmenn og javnaðarmenn eru eisini komnir illa fyri av bók Zachariasar. Teir tykjast føra fram, at Føroyar eru innlimaðar í danska ríkið, og at samgongan nú skal skræða Føroyar leysar. Teir krevja kvalifiseraðan meiriluta. Men her hava sambandsmenn og javnaðarmennn sama trupulleika sum forsætisráðið í Keypmannahavn: Borgarin krevur, at tit vísa á, ja, prógva nær, hvar og hvussu henda innliman er farin fram. Megna tit tað ikki, eru tað tit sum vilja broyta grundleggjandi ríkismørk og innlima okkum í danska ríkið. **Tað** krevur undir øllum umstøðum kvalifiseraðan meiriluta. Uppskot sambands- og javnaðarmanna fáa valla undirtøku frá 75% av føroyingum, og so er bara ein møguleiki eftir at fremja tey: at halda áfram at vanvirða fólkaræðihugmyndina. Miðflokkurin er nýggjur flokkur, og tí man vera lættari hjá honum enn øllum hinum at gera borgarunum greitt, hvar hann stendur í hesum máli. Loksins mugu vit borgarar rannsaka okkum sjálvar og tey, sum hava sitið við umboðsvaldi í Føroyum uttan at skilja ella viðurkenna, hvør ið veruliga skipanin var. Vit mugu gera okkum greitt, at samfelagsmoralur er týdningarmesta fortreyt fyri fólkaræði.Yvirhøvur ber til at seta fram hesa meginreglu í tí Harrans ári 2000: Er fólkaræði veruleiki, so er fremsta politiska uppgáva borgarans at taka lut í kjakinum um at áseta og býta samfelagsvirði; men er tað ikki, má fremsta politiska málið vera at fremja fólkaræði.Eitt nýtt støði undir føroyskari nútíðarsøgu. Sum eg dugi at síggja, er tað, sum Zacharias Wang hevur lagt fram í bók síni, bara eitt støði undir víðari gransking. Tað eru óteljandi leysir endar, sum rithøvundurin hevur valt at lata hanga eftir. Hann hevur avmarkað evni sítt og kann tí ikki svara øllum spurningum; men tað er eingin ivi um, at niðurstøður hansara eru higartil besta grundarlagið fyri at skriva politisku nútíðarsøgu Føroya. Sumt av tí, ið verður viðgjørt í bókini, eigur eisini at elva til víðari kjak. T.d. ber til at spyrja, um kongur hevði loyvi til at taka aftur vald, sum hann hevði givið føroyska fólkinum í 1946. Tað kann hugsast, at allar gamlar skipanir vórðu tiknar av, tá ið Føroya Løgting varð upployst, og at heimastýrisskipanin var einvíst donsk. Tá er talan um danska tvangsinnliming, og tað er sera álvarsamt mál. Tó hetta má danska forsætisráðið gera greitt. So leingi tað ikki verður gjørt, stendur útlegging Zachariasar um gomlu einaveldisheimildirnar sterkari.Eitt annað mál, sum til ber at kjakast um, er spurningurin, um Grønland framvegis er innan gamla norska ríkismarkið saman við Føroyum. T.d. ber til at siga, at inuittarnir ikki eru beinleiðis arvtakarar til ríkisborgaraskapin hjá norrønu grønlendingunum. Um teir verða mettir sum koloniserað fólk, sum er innlimað í Danmørkina og hevur góðkent heimastýrisskipanina við fólkaatkvøðugreiðslu, so hoyra teir ikki við til argumentatiónina hjá Zachariasi. Hesum spurningi verða teir sjálvir at svara, men hetta ávirkar ikki niðurstøðurnar viðvíkjandi ríkismarkinum millum Føroya og Danmarkar.Zacharias Wang viðger sera leysliga fíggjarligu viðurskiftini millum Føroya og Danmarkar. Á hesum øki liggur nógv og bíðar eftir at vera grivið fram og viðgjørt, so tað kann verða, at okkurt av hesum ikki er heilt rætt. T.d. loyvi eg mær at ivast í, um Føroyar hava verið útreiðsla hjá ríkismyndugleikunum síðani 1877. Men heldur ikki hetta vikar høvuðsniðurstøðurnar í bókini.Vit hava fingið eina samanhangandi, stjórnmálafrøðiliga lýsing av støðu Føroya, sum á sín hátt greiðir tey viðurskifti, sum aðrar lýsingar hava latið staðið sum andsagnir ella barasta lopið um. Ósamanhangandi og brotkenda útleggingin av stjórnarstøðu Føroya, sum higartil hevur verið, hevur nú loksins fingið ta avbjóðing, sum í veruleikanum átti at verið framsett fyri langari tíð síðani. Tey, sum bjóða seg fram til at hava politiskt vald í føroyska samfelagnum verða nú at byggja út sjónarmið síni, at mótprógva sjónarmiðum Zachariasar — ella at taka undir við teimum. Øllum teimum, sum hava áhuga fyri føroyskum stjórnarmálum og sum ætla sær at greiða atkvøðu á komandi fólkaatkvøðugreiðslum og valum, fari eg at mæla til at lesa hesa spennandi og lættlisnu bók.



## Viðmerkingar:

*Fundur um Fibromyalgi - og fundur um at stovna Fibromyalgi-bólk*

# Fibromyalgi

Hin 22. apríl 1999 skipaði Giktafelag Føroya fyri fyrilestri um fibromyalgi. Í hesum sambandi varð avrátt at skipa fyri einum fibromyalgi-bólki, ið skal virka innan karmarnar hjá Giktafelag Føroya.

Giktafelagið fer í næstum at skipa fyri, at ein bólkur verður settur á stovn, ið skal virka innan karmarnar hjá Giktafelag Føroya.

Giktafelagið fer í næstum at skipa fyri, at ein bólkur verður settur á stovn, ið ætlandi skal arbeiða sjálvstøðugt við fibromyalgi innan karmarnar hjá Giktafelag Føroya.

Fundur um at skipa Fibromyalgi-bólki verður hin 5. februar, kl. 14.00 í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10, Tórshavn. Filmurin »At leve med Fibromyalgi« verður vístur.

Fibromyalgi er kronisk, ikki sjónlig sjúka, ið serliga rakar kvinnur í 30-40 ára aldri (08-90%). Menn og børn kunnu eisini fáa sjúkuna.

Sjúkan er kend undir nógvum ymiskum heitum. Í Føroyum verður sjúkan ofta nevnd »Myosis Variae« ella »Vøddagikt«. Sjúkan kann eisini hava heitið »Myofibrositis«, »Myalgi«, »Fibrositis« ella hava annað heiti.

Orsøkin til sjúkuna er ókend.WHO klassifiserar sjúkuna undir giktasjúkum. Mett verður, at títtleikin av sjúkuni er uml. 1-2%.

Sjúkan er torfør at greina, tí at sjúkraeyðkennini eru nógv og spjødd. Aðalsjúkraeyðkenni er kronisk pína í liðum og vøddum, í øllum kropspørtum og kronisk møði.

Pínan er svíðandi og brennandi. Húðin er eym og følsom, sum um hon er sólskoldað.

Kroppurin kennist sum »blýggj«, og rørslurnar eru »trekar«, hetta kennist serliga ringt um morgunin.

**Sjúkueyðkenni eru:**

Vøddapína (brennandi/svíðandi)
Viknaðir vøddar (vøddamegin er í miðal uml. 30% lægri enn hjá frískum fólki)
ovurviðkvæm húð
troyttheit
svøvnloysi
svimbul
høvuðpína
sjónarólag
ljóðviðkvæmi
hjartabankan/hitaherðindi
leyst/hart lív
prikan og stingan í húðini
konsentratiónstrupulleikar/ og vánaligt stutttíðarminni (serliga í sambandi við overving)
lætnan/fitnan
ampi/strongd.

**Viðgerð**

Munadygg viðgerð, heilivágur ella annað, finst ikki. Roynt verður at linna pínuna við ymsum pínuheilivági, viðgerð í heitvatnshyli, akupunktur og annað mangt.

**Læra at leggja lívið um**

Við tað at sjúkan er kronisk og gevur varandi avmarkingar í gerandislívinum, og av tí at lekidómur ikki finst, er sera umráðandi at duga at »leggja lívið um« - at finna nýggja javnvág í gerandisdegnum.

# Skaðafrøi og ósannindir á prenti

Vit hava leingi lukkuliga gloymt, at nakrar prentaðar síður, sum rópa seg Dagblaðið, hava verið spjaddar sumstaðni kring landið. Skrivi- og talufrælsi hava vit tíbetur, og tað skal vera teimum væl unt, ið tíma at lesa síðurnar.

Sum vit hava frætt, er sonevndi skemtiteigurin sum í gomlum døgum. Har verður tað sagt, ið ongin vil leggja navn til. Tað ger nú heldur onki, um talan er um skemt við viti og broddi. Tíverri hava vit frætt, at gamla sjúkan við at speireka fólk vegna rasu, kropslig ella sálarlig brek ella vegna óhepnar lívsumstøður, heldur fram.

Væntandi var tað tí eisini, at skaðafrøi um óhapp hjá øðrum fór at halda fram sum í gomlum døgum. Ikki minst nú ein tjóðveldistingmaður var fyri óhappi, sum tíbetur - vegna framúr góðan sjómansskap — ikki gjørdist ein sorgarleikur. At prik koma millum fólk og samanberingar við politikkin, var væntandi. Tað hevur sína sjarmu, sum ongin eigur at taka sær tykni av, tí tað er neyvan illa meint. Men at seta slíkt uppá prent sigur okkum mest um tey, sum skriva.

Tá so umframt ta einføldu skaðafrøina verður borðreitt við beinleiðis óndsinnaðum lygnum undir heitinum skemt, eiga vit at tala at. Vit mugu bara staðfesta: Gott at hetta eru undantøkini, og at hetta landið eisini hevur fostrað onnur fólk. Sum kenna markið millum álvara og skemt og sum kenna markið millum virðing og vanvirðing.

Ikki minst teir sjómenn, ið framvegis lívbjarga hesum landi við sínum egna lívi sum íløgu. Tey sum hava lisið Føroya Siglingarsøgu vita, at hesin, sum nú verður logið uppá, hevur einaferð áður staðið við lívinum hjá sær og manning í stórum vanda. Tað var tá hann gjørdi tað bragd at bjarga manning, skipi og farmi undir ómøguligum umstøðum í ísinum í Grønlandi.

**Ting- og landsstýrismanning Tjóðveldisfloksins.**

**Heini. O. Heinesen, Jógvan Durhuus, Annita á Fríðriksmørk, Finnur Helmsdal, Hergeir Nielsen, Karsten Hansen, Signar á Brúnni, Páll á Reynatúgvu, Finnbogi Ísakson, Høgni Hoydal**

# Kórstevnan 2000

Í sambandi við stevnuna Kórstevnur Føroya tríati ár í 1997 varð tað avrátt, at høvuðsstaðurin aftur skuldi verða karmur um kórstevnuna ár 2000.

Ein av gestakórleiðarunum tað árið var John Høybye, sum longu tá legði okkum til at hava verkið Sacred Concert hjá Duke Ellingston, ið John sjálvur hevur skipað fyri sopran solo, kór og stórband, sum eitt av høvuðsverkunum til okkara Kórst4evnu 2000. John Høybye og hansara frálíka kór Tritonus fingu tann heiður at verða boðin yvir til USA í fjør at framføra verkið í heimbýi Duke Ellingstons og eisini í New York í sambandi við, at 100 ár vóru liðin, síðan gitni tónleikarin varð borin í heim. Tritonus, sum fleiri ferð áður hevur vitjað hendavegin, verður eisini við á kórstevnuni í ár.

Orkestur til framførsluna av Sacred Concert verður 20-manna úrvalsbólkurin Jaspis, sum telur læarar á Føroya Musikkskúla og framkomnar næmingar, sum fleiri nú eru undir hægri útbúgving uttanlands. Sangsolistur verður gitin svensk songkvinna, sum eitur Eleonor Johansson, og væntiliga fer eisini føroysk steppdansarinna at verða við til framførsluna.

Av tí at tað er avmarkað, hvussu stórt kór er hóskandi til hetta verk, og eisini tí at kórsambandið ynskir at gera nakað serstaks burtur úr stevnuni í hesum ári, fer umframt John Høybye eisini kvinnuligur kórleiðari at taka sær av felagskóri. Hon er norsk, eitur Tone Bianca Dahl, starvast m.a. á Østlandets Musikkhøyskole og er dagligur leiðari av manskórinum Den norkse Studentersangforening. Tone hevur enn ikki tikið støðu til, hvørjum verkum hon fer at arbeiða við; men vit kunnu vænta okkum eitt ljómandi úrval av norðurlendskum og europeiskum kórtilfari.

Tvídráttur hevur verið um, nær árliga kórstevnan eigur at verða hildin; men í Kórsambandi Føroya ræður tann sannføring, at vanliga er bert dýrabiðidags vikuskiftið fullgott, tí royndir á hvørjum ári vísa, at stevnan í Kristi himmalsferðarhalguni mestsum dettur sundur, av tí at alt ov nógvir kórsangarar ikki hava fvrí frá arbeiði tann fríggjadagin.

Tá ið Kórstevnan 2000 kortini verður hildin í sambandi við Kristi himmalsferðardag, er tað tí, at tað til hesa merkisstevnu er tørvur á fleiri døgum. Tí heitir kórsambandið á allar kórsangarar, sum ætla at verða við á stevnuni, um, har møguleiki er til tess, at tryggja sær arbeiðsfrí fríggjadagin 2. juni, tí hann verður høvuðsvenjingardagurin.

Enn er ongin neyv stevnuskrá løgd; men í høvuðsheitum verður gongdin nn, at sangararnir møta mikukvøldið 31. mai á Eysturskúlanum, har tey, sum fáa tað, fáa innivist. Eftir at stevnan tá er sett, verður farið undir fyrstu venjingina.

Hósmorgunin, Kristi himmalsferðardag, verður venjing fyri kirkjutíð og aftur eftir døgurða. Út á seinnapartin fara kórini bussútferð at hava konsertir í kirkjum og samkomuhúsum úti um landið.

Fríggjadagin verður venjing fyrrapart og seinnapart, og um kvøldið framføra einstøku kórini stutta skrá í Norðurlandahúsinum.

Hesi trý kvøldini hava kórsangararnir høvi til at hugna sær saman »after singing«.

Leygardagin verður venjing fyrrapart, og eftir stutta aðalroynd verða so tey stóru felagsverkini at hoyra á konsert í Norðurlandahúsinum, sum byrjar kl. 17.00. Kórstevnan 2000 endar síðan sum vant við veitsluhaldi.

Limakórini fáa nærri at vita um tilmeldingarfreist, kostnað, gjaldingarhátt, gisting, gjølliga stevnuætlan o.a.m., eins og nærri eisini verður lýst um hesi viðurskifti í bløðunum við teim »kórleysu« í huga.

# Til minnist um okkara góða vin Petur Arna Jacobsen

*f. 30. juli 1980 d. 23. juni 1999*



Sjey mánaðir eru nú gingnir síðani Petur Arni so bráðliga doyði. At Petur Arni skuldi fara her frá, bert 18 ára gamal kom sera óvart á okkum. Ongantíð høvdu vit hugsað tann tankan, at Petur Arni ikki skuldi blíva gamal, hann, sum altíð var so fullur av lívi. At missa teg góði Petur Arni, er so ómetaliga svárt, og lívið verður ongantíð tað sama aftur. Men minnini um teg kann eingin taka frá okkum, og tey eru bæði nógv og góð.

Petur Arni kann ikki samanberast við nakran. Tað sum var so serstakt við Petur Arna, var at hann altíð var í góðum hýri og av tí sama, vóru øll so sera góð við hann.

Nógvar góðar og stuttligar løtur, høvdu vit saman við Petur Arna, bæði á arbeiðsplássinum og í frítíðini. Har ið okkurt stuttligt fór fram, var Petur Arni, altíð mitt í rokanum. Eisini kann sigast um Petur Arna at hann var altíð nemmur at tosa við bæði til stuttleika og í álvara. Petur Arni var væl dámdur allastaðni, bæði av ungum og gomlum. Ongantíð vilja vit gloyma teg og tær góðu løturnar, vit fingu saman við tær, men goyma hvørja einstaku løtu saman við tær væl í hjørtum okkara.

Tá vit fylgdu tær til títt seinasta hvíldarstað her á foldum, sást týðuliga á tí stóra skaranum, hvussu nógv vóru góð við teg og fóru at sakna teg.

Góði Petur Arni takk fyri alt tú vart í okkara lívi.

Guð signi minnið um Petur Arna.

**Jana, Herdis og Niels Pauli**